## § 10. Ásetingar fyri øki D: Havnaøki.

1. Økið verður lagt av til havnaendamál og virki, ið hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við hesi.

2. Byggistigið fyri havnaøki sum heild má ikki fara upp um 0,3

3. Eingi hús ella einstakir partar teirra mugu verða hægri enn 8m yvir miðaljørðildi (miðal við húsahornini).

4. Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 10m ella nærri aðrari bygging enn 5m.

5. Loyvi kann gevast til at gera goymslutunnlar inn í fjallið.

6. Býráðið hevur heimild til at gera, ella geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið sum er lagt út sum havnaøkið á plankortinum.